# Mc- Føroyar er nú stovnað

*Sunnudagin 3 september var stovnandi fundur av felag fyri øll sum koyra motorakfør á 2 hjólum og øðrum motoráhugaðum. Eini 30 fólk vóru møtt.*

Endamálið við felagnum er at samla motorsúkklukoyrarar og motoráhugaði í einum felag fyri at røkja felags áhugamál, at arbeiða fyri skilakoyring og at skipa fyri felagstúrum og ítróttarkappingum.

Á fundinum vórðu 8 fólk vald í nevndina, sum hevur skipa seg soleiðis.

Formaður Niels Kári Nielsen. Næstmaður Jan Stenberg. Skrivari Maika L. Dahl. Kassameistari Petur Jacobsen Jensen.

Nevndarlimir eru: Agnar Dahl, Torkil Hansen, Hugin Janusarson og Sjúrður Eldevig.

Nevndin er longu farin til verka, tað fyrsta verður at finna eitt høli at vera í, sum bæði kann brúkast til at møtast í og kanska eisini til felagsverkstað.

Annars verður arbeitt við at kanna møguleikarnar fyri at gera ein bana, sum kann brúkast bæði til kappingar og koyrifrálæru. Felagið hevur fingið samband við feløg í Danmark fyri at kanna fyrimunir og vansar við slíkum koyribreytum.

Eisini er ætlanin til næsta ár at fáa meira samskipaða koyring, til dømis við telefonketu og nøkrum føstum felagstúrum um árið. Nevndin miðar eftir at vera komin væl ávegis við arbeiðinum tá næsti limafundur verður í November. Nú nakrar vikur eftir stovnandi fundin er limatali longu komi uppá 50.

E-mail
nkn@post.olivant.fo

# Ein føðingardagsheilsan

Til gummu í Hoydølum, sum bleiv 40 ár 18. sept. Hjartaliga tillukku «góða gumma« soleiðis siga vit her heima hjá okkum. Tú eitur eftir ommu, Marin Katrina og tað kann tú vera errin av.

Gumma er nakað heilt fyri seg, tí eigur hon hesa heilsuna. Tað er bara so nógv, ein kundi sagt um hana. Hon er so livandi og virkin, altíð til dystin fús. Tað er líkamikið hvat, men best dámar henni at fara til fjals ella í hagan, at reka seyð, er lívgevandi fyri hana, vit hava verið nógvar góðar og ríkar løtur saman við gummu, hon er bara so góð við okkum, øll børnini er hon líka góð við.

Góða gumma, stóra tøkk fyri at vit altíð kunna koma í Hoydalar til tykkum, har er so gott at vera.

Í summar vóru vit túr í tjaldi við henni, ja eitt er vist, at var tað ikki bara gumma, ið var við okkum, so fóru vit heimaftur fyrr enn ætlað, tí tað regnaði heilt illa, men treisk er hon, og gevst ikki, tað skal fullførast, stóra tøkk fyri túrin ta ferðina.

Altíð tá vit ferðast í hoydølum og vit skulu fara heimaftur til Velbastaðar til okkara, endar ferðin altíð oman í svimjihøllina at svimja, tað veit hon er so gott fyri heilsuna, tað er so deiligt at enda eina góða ferð við.

Vit hava jarðabrúk og tað kennir hon alt til, er sjálv vaksin upp har, hon er so góð við heimbygd sína og hevur givið børnum sínum henda dýra arv, at vera góð við alt tað, hon sjálv fekk við sær í uppvøkstrinum, tað er ein góð fyrimynd at eiga, og geva frá sær.

Hjarta hevur gumma á røttum stað. Hon eitur eftir ommu síni á Velbastað, sum eisini var nakað fyri seg, so hon kann vera errin av tí, «hon kundi væl brúka hendurnar«.

Nú stendur heystfjalli fyri durðum «at tú ert væl fyrireika« tað vita vit øll, tí tað elskar hon. Vaska vembur og fáa alt so gott frá hondini, tað er bara tað besta hjá henni, vit gleða okkum at verða saman við tykkum øllum, tað er kjarnan í lívinum. Vit hava so brúk fyri hvørjum øðrum – stór og smá –.

Vit takka fyri frálíkan blíðskap fríggjakvøldið, blíðskap og at føla seg væl, tað duga tit bæði sera væl. Gumma er trúføst og álítandi, er altíð at heita á. Stóra tøkk fyri alt tú ert fyri okkum og so livandi eitt menniskja, tað hava vit brúk fyri.

Vit ynskja happadrúgva framtíð fyri teg og húski títt. Bestu kvøður nú Mikkjalsmessan nærkast og fjøllini verða givin.

**Frá okkum
Ingeborg**

Kommununval 2000:

# Kommuna við samábyrgd

*Hvat skal kommunuvalið í Tórshavnar kommunu, ið telur meira enn ein triðing av Føroya fólki, snúgva seg um? Skal valið hava eitt veruligt innihald um framtíðina hjá øllum borgarunum í kommununi, ella skal hvørt valevnið í sínum lagi bara egna fyri seg sjálvan?*

Svarið skuldi verið sjálvsagt.

Fara vit í huganum eini 8-10 ár aftur í tíðina, vita vit, at støðan hjá landi og kommunum var út av lagi vánalig, men so væl hevur viljað til, at vit eru rættiliga komin fyri okkum aftur, hóast ikki allar súðir eru syftar enn. Byrurin hevur verið heilt góður, men samstundis hava tey allarflestu fólkini, ið hava staðið á odda, víst ábyrgd og ásannað, at vit mugu ikki koma okkum aftur sama díki. Hetta er eisini galdandi fyri Tórshavnar kommunu. Sitandi býráð kann vísa á framúr góð úrslit at leggja fyri fólksins dóm, og sjálvandi eigur hesin politikkur at fáa eitt valskeið afturat; við sama skipara!

Kommunan er væl á veg at berja øll fíggjarlig fjøtur av sær og er vorðin munandi størri, sterkari og ríkari hesi fýra árini. Henda góða kósin skal haldast. Landsins høvuðsstaður má hava so mikið stórt fíggjarligt rásarúm, at møguleikar eru at endurnýggja seg og hyggja frameftir. Sum bygdaráðslimur í Argja kommunu 1993-96 veit eg, hvussu støðan var. Ta ferðina var tað lítið lokkandi at stilla upp til bygdaráðsval. Vit funnu so fram til - saman við tí tá sitandi býráðnum til eina varandi og haldgóða loysn fyri borgararnar í Argja kommunu. Fáur man í dag muta ímóti tí avgerðini, og ein onnur rættiliga stór kommuna við nógvum møguleikum, Kollafjarðar kommuna, hevur tikið somu avgerð, men ivaleyst av eitt sindur øðrvísi orsøkum. Tað kennist væl nú at síggja, at handa avgerðin var tann rætta, hóast okkurt smávegis kann vera at seta fingurin á, men tað hevur einki at siga í longdini. Nú er „tilslagingartíðin" farin afturum í øllum góðum, og vit í gomlu Argja kommunu kunnu við góðum treysti líta frameftir. Eg ynski eisini kollfirðingum vælkomnum í Tórshavnar kommunu og vóni, at teir fara at trívast væl og fáa nógv burturúr.



*Regin av Steinum*

Grundarlagið undir fíggjarorkuni hjá kommunum er hvør einstakur skattgjaldari, sum tí hevur bæði rætt og skyldu at fylgja við býráðsarbeiðinum. Kommunuskatturin fyri alt landið er upp ímóti 90% av landsskattinum, so her er talan um eina tunga byrði fyri hvønn borgara. Øll vildu vit havt hesa byrði eitt sindur lættari, og tað kunnu vit helst eisini fáa, um skil og samvitska vera sett í hásæti í staðin fyri skilaloysið frá áttati árunum, tá ið kommunurnar fingu - við loyvi frá landsstýrinum - at læna seg út á sjógv, og skattaprocentið var ósambæriliga lágt.

Innan fyri hendan avmarkaða fíggjarkarmin skulu vit búleikast, men summi valevni hava ikki altíð hetta fremst í huganum. Tað er ólíka lættari at spyrja (tilvildarlig?) fólk í busskýlum, um tey keða seg, og síðani blása hetta upp til tann stóra tørvin. Vit kunnu vera og hava eisini loyvi at vera ymisk á máli um mangt og hvat í kommununi, men at halda fast um fíggjarliga førleikan og sjálvbjargnið kommun-unnar eiga vit at hava fremst í huganum!

Orðið kommuna merkir felagsskapur, og tað er júst felagskensluna vit skulu styrkja í hesum tíðum. Ein samhaldsfastur og solidariskur felagsskapur, sum er førur fyri at fremja munagóðar loysnir skjótt, t.d eitt nú tað átrokandi ansingarmálið. Henda samábyrgdin er eisini neyðug, tí at kommunan eftir fáum árum er munandi vaksin bæði í støðd og fólkatali, men umboðini lutfalsliga fækkað.

**Regin av Steinum
valevni í
Tórshavnar kommunu
fyri Tjóðveldisflokkin**

# Forskúlaflokkar — ein viðmerking

Tíverri fekk eg ikki verið á øllum almenna fundinum hjá Foreldrafelagnum mikukvøldið. Heðin Mortensen nevndi stutt í sínum uppleggi møguleikan fyri forskúlaflokkum, men meir var ikki sagt, meðan eg var har. Helst hevur onkur tó umrøtt málið seinni. Av og á fái eg varhugan av, at forskúla- ella barnagarðsflokkar er eitt ljótt orð. Tað kann ikki vera rætt at senda børn í skúla 5-6 ára gomul, siga summi. Men hví skulu foreldrini ikki sjálv hava loyvi at velja tað, sum tey halda er best fyri barnið? Loyvi eg mær her at seta fram mína áskoðan um málið.

Tað, sum tey atfinningarsomu tykjast at ræðast, er, at forskúlin gerst eitt goymslustað, og ikki á sama hátt mennandi fyri børnini sum okkara dagsstovnar. Eg skilji ikki reiðuliga hesa ræðslu. Sjálvsagt mugu gerast neyðugar fyriskipanir og setast neyðug krøv, ið tryggja góðskuna. Einki er, sum forðar fyri hesum. Harafturat kemur, at ein forskúlaskipan ikki verður kravd. Tað verður sjálvboðið, um foreldur ynskja barnið í forskúla, ella tey vilja lata tað ganga eitt ár afturat í barnagarði.

Skulu skúlarnir hava forskúlaflokkar (tað verði seg á skúlunum sjálvum ella í tilknýti til teir), setur hetta sjálvsagt krøv til m.a. høli. Sum er, stendur tíverri illa til, tí skúlarnir eru um at bresta. Men tá ið hetta er sagt, kann tó leggjast afturat, at tað kemur næstan ikki fyri í dag, at ein flokkur ikki hevur sína egnu stovu. Fyrr var hetta vanligt.

Givið er tó, at byggjast má afturat á flestum skúlum. Og neyvan kann alt gerast í senn. Við einum góðum vilja átti tað tó at verið møguligt at sett forskúlaflokkar á stovn longu komandi ár á teim flestu størri skúlunum í kommununi. Hetta við einum lyfti um, at hølisviðurskiftini verða loyst sum skjótast.

Somuleiðis má frítíðarskúlin víðkast. Øllum forskúlabørnum má standa í boði at sleppa í frítíðarskúla. Eisini her verður neyðugt við íløgum. Í ávísan mun er tó møguligt um morgunin at nýta frítíðarskúlan til forskúlabørnini (tey kunnu so ganga í skúla seinnapart). Men einki er at ivast í, at frítíðarskúlin má hava betri hølisviðurskifti. Ein forskúli er longu í kommununi, og mær vitandi virkar hann væl. Í øllum førum er hann vælumtóktur. Nógv børn verða á hvørjum ári avvíst, tí ov fá pláss er. Hetta hóast nógv kanska ikki vita um møguleikan ella hvussu søkt verður. Men Sankta Frans skúli hevur eisini ein vælvirkandi frítíðarskúli, og tað er neyðugt.

Eg eri vísur í, at hevði sama tilboð verið á øllum skúlum, so hevði helvtin av foreldrunum valt at sent barn teirra í forskúla. Hetta er eisini vorðið tað vanliga í okkara grannalondum. Eru vit so nógv klókari ella øðrvísi enn tey? Kanska, men tilboðið eigur í øllum førum at vera har. Foreldrini eiga sjálv at kunna velja.

At enda aftur til fundin hjá Foreldrafelagnum. Hví alt hetta um forskúlar? Hvat hevur tað við vantandi stovnspláss at gera? Hóast evnini kunnu tykjast ymisk, so hava tey tó børnini í felag. Fer ein hálvur árgangur av børnum í forskúla, so verða kanska 150 pláss tøk á stovnunum. Hetta hevði munað á bíðilistanum. Eisini trúgvi eg, at tað er dýrari at gera stovnspláss, bæði tá ið tað snýr seg um rakstur og íløgur.



*Klæmint Olsen*

Men hví koma so eingir forskúlaflokkar? Hetta er ein góður spurningur, ið krevur eitt longri svar. Og tað má bíða til næsta umfar.

**Klæmint Olsen
býráðslimur**



# Svarti oktober grør

Tey ymsu dagsins mál krevja dagliga sítt, og tá er skjótt at missa sambandi aftureftir. Nógv mál, sum liggja frammaliga nú, ganga aftur til 6. okt. 1992 og tíðina aftaná.

Danskir politikkarir og fjølmiðlafólk viðgjørdu Føroyar dagliga. Enntá útlendskir serfrøðingar vóru sendir higar at siga okkum, hvat vit skuldu gera.

Danskir serfrøðingar høvdu eisini nógv uppá hjarta. Allir hesir serfrøðingar visti ráðini, meðan flestu føroyingar tóktist ráðaleysir, men lív og stríðsvilji var eisini at hóma hjá fleiri. Sum skotin Montgomery segði í Sahara: »We will never surrender«.

Men vit mugu ikki gloyma, at tey størstu og mest tíðandi dagsins mál fara langt aftur um 6. okt. tey hoyra allari øldini til.

Onkur heldur, serliga leiðarin í sambands-flokkinum og javnaðarflokkinum, at hesi mál eru tikin fram aftur til stuttleika. Leiðarin fyri javnaðarflokkin sigur upp í saman, at tað er persónlig forfeingiligheit at vilja fáa Merkinum altjóða viðurkenning, so tað kann veitra millum hini merkini á ST borgini. Tosið um frælsið verður svarað við: »Arbeit macht frei«, sum nazistarnir skammuliga misbrúkti í týningarlegunum.

At vit vilja hava málið viðurkent sum tjóðarmál er bara møsn.

Tað føroyska málið, sjálvstýrisrørslan og Merkið eru saman við stríðnum fyri sosialari rættvísi høvuðsmálini í allari farni øldini.

Tann demokratiska tilvitanin hoyrir eisini saman við farnu øld, men fult demokrati er ikki her fyrr enn vit hava, í hvussu so er fullveldi, helst republik.

Fyri Kristi føðing funnu grikkar upp á demokratiið, og teir sóu tíðliga vansarnar, sum kundu vera við tí. Eitt teir serliga ávaraðu ímóti var, at politikkarnir bara tosaðu fólki eftir munni, ella at teir snaraðu tí sagda á hjá mótstøðumanninum, misskiltu evnið við vilja.

Satt demokrati kravdi høgan politiskan moral, og síðst, en ikki minst, at avgerðirnar vóru tiknar, tí tær tæntu samfelagnum best. Fleiri dømir eru um, at griskir politikkarir fyri egnan vinnings skuld tosaðu til frama fyri onnur fólk, men lótust sum um teir gjørdu tað fyri at tæna sínum fólki. Søgunar dómur yvir hesi fólk er ikki mildur, tað var samtíðir dómurin nú heldur ikki.

Formaðurin í fólkaflokkinum, sum eisini er fólkatingsmaður, hevur sagt, at tað sjálvandi var løgið fyri hann at krevja eina skipan, sum kappaði greinina, hann sjálvur sat á.

Hann viðgekk hesa tvístøðu, men sami flokkur eigur løgmann og onnur, sum kunnu mynda tjakinum fyri føroyskum fullveldi. At so sami maður viðhvørt roynir at finna sær løgir, so ella so, at leggja fót fyri fullveldis ætlanunum, fær teg at spyrja, um hann ger tað fyri at tæna egnum áhugamálum ella samfelagsins.

Formaðurin í javnaðarflokkinum er í einari sera óhepnari støðu. Hann skal ikki bara tæna tveimum harrum heldur trimum: Løgtinginum, Fólkatinginum og so er hann eisini sjálvur grundarsteinurin, sum danska stjórnin byggir á.

Her heima er hann so gott sum einsamallur at mynda flokkin (soleiðis hevur tað altíð verið í flokkinum). Hvat so enn danska stjórnin sigur ella ger viðvíkjandi Føroyum, er hann altíð í parti við teimum. Herfyri spurdi Per Højgård hann í Útvarpinum, um ikki okkurt var at finnast at í danska politikkinum mótvegis Føroyum, men hann svaraði ikki, og Per spurdi ikki uppaftur, tó sami tíðindamaður plagdi spyrja og spyrja upp í saman.

Tá ið tú undrast um hesa ótrúligu semju millum danska og føroyska javnaðarflokkin, fært tú tað fjákuta svarið: »Tað er okkara demokratiski rættur at hava ta meiningina« ið altíð er tann sama, sum tann hjá Nyrup. Hvat svarast til tílíkt. Tosar nakar um demokratiska rætt Haiders í Eysturríki til at hava sínar politisku meiningar t.d. Funnist verður at hansara politikki, og tað er tað, sum hevur verið gjørt viðvíkjandi javnaðarflokkinum. Men hetta neyðarsliga og hjálparsleysa svarið sigur ógvuliga nógv um, hvussu burtur av allari leið javnaðarflokkurin er dreivaður.

Javnaðarflokkurin hevur havt siðvenju at sita í fólkatinginum og stemma tað sama sum danski javnaðarflokkurin, men støðan er broytt. Nú er tað dagligur kostur, at donsk og føroysk áhugamál standa móti hvørjum øðrum. Tú noyðist at velja síðu, og tað ger, at javnaðarflokkurin hvørja ferð er fyri donskum áhugamálum og móti føroyskum. Skilja javnaðarfólk veruliga ikki tann vandasjógv flokkurin er komin í? Ella er har fullkomið einaræði. Sum danir siga: »Kæft trit og retning«. At formaðurin í javnaðarflokkinum t.d. altíð brúkar orðið loysing ístaðin fyri fullveldi er hvønndagskostur.

Við vilja at misskilja mótstøðupartin og so látast sum um tað var tað hann segði, er sera vanligt í politikki, men fyri tí eins skaðiligt fyri demokratiið.

Tað er nú ikki bara í sambandi við politikkin millum Føroyar og Danmark, at javnaðarflokkurin vinglar aftan á dønum, men henda vinglan ger hann púra í ørviti.

Allir hinir javnaðarflokkarnir í hinum Norðurlondunum ikki bara aksla seg av nýggjum, onkur sigur, at teir hava lagt kósina 180 stig um, men rættast er nokk at siga, at teir royna at finna eina nýggja kós. »Stå aldrig til søs, lad de andre står/så får du stribevis af kors og bånd med mange stjerner på« havi eg fyrr sagt um javnaðarflokkin, tó tíðir broytast.

Men aftur til hin svarta dagin í oktober, tá fór aftur okkurt at kvaklast við í Føroyum. Við rygginum móti bakkatromini ella bládýpinum var bara ein vegur og farið var til gongu. Fyri hvørt árið og nú tey seinastu árini fyri hvønn mánað eru fleiri og fleiri, sum vilja hava skipaði viðurskiftir við danir og hesi fólk vera bara meiri sannført sum tíðin gongur.

Andstøðuflokkarnir látast at hava gloymt, at danir søgdu »Nu er sandhedens time kommet til Færøerne« og Nyrup legði høvdi á skák og segði alfaðirliga: Jamen er det det i ønsker, so vil vi ikke hindre jer i det. Valget er jeres.

Hvussu hevur hann so tikið móti hesum landsstýrinum, sum hevur meirilutan av fólkinum aftanfyri seg. Minst til at hesin meiriluti, tey nógvu av teimum, um tey ikki á bíbilskan hátt hava sæð ljósið ella eru umvend, eru tey vaknað og tosa nú heilt annarleiðis um politikk, ikki minst tann politikk, sum viðkemur sambandinum millum Føroyar og Danmørk.

Sum ein dani tók til »Færøsagen har samlet danskerne« eg legði afturat, tað ger hon eisini í Føroyum. Minnist tá aftur á tosið bara fyri einum ári síðani ella undan valið er tað, sum um eitt nýtt fólkaslag hevur tikið búgv í oyggjunum.

Allastaðni, kanska undantikið fundamentalistiskar kjarnuveljarar hjá javnaðarflokkinum og sambandsflokkinum, merkir tú ein arbeiðshug og lívsfýsni. Fólkatalið økist. Nógv g fólk í besta aldri flytur aftur. Nakað herfyri segði ein skilamaður mær, at eg ánaði ikki, hvussu nógv vællærd fólk, sum sótu í góðum størvum aðrastaðni, vildi koma aftur itl Føroyar. Men javnaðarflokkurin heldur áfram við at spáa fólkaflyting, tí tey skulu eitast at fáa fleiri pengar aðrastaðni. Fyrr sum nú eru pengar hóast alt ikki alt.

At samráðingarnar við danir blivu truplar var altíð væntandi. Eg plagdi at minna á, hvussu drúgvar samráðingarnar vóru hjá íslendingum bara at fáa tey íslendsku handritini til Ísland, men tú kanst aldrin siga nakað við fullari vissu frammanundan.

Tað lá har og spøkti aftan fyri alt. Júmen um nú danir skilja henda søguliga møguleika til at geva okkum somu sømdir, sum Ísland fekk í 1918. Hetta hevði verið nakað fantastiskt. Ein glógvandi hending, sum hevði sæst í øllum londum og øll Norðurlond høvdu voksið við tað. Soleiðis gera rættir norðbúgvar.

Og landsstýrið hevur nakað roynt at visa og rætta so javnaðarflokkurin kundi taka undir við áheitanini, men alt til onga nyttu. So far so good, sum bretar siga. Ikki nyttar at gráta um spilta mjólk. Vit eru komin langt. Vit standa sterk. Vit hava eina góða søk. Eitt rættvísir krav, sum altjóða samfelagið tekur undir við og virðir.

At formaðurin í javnaðarflokkinum kundi søkka so djúpt og vera so fjákutur, at hann roynir at billa fólki inn at flent verður at okkara hátt virda landsstýri. Hevur maðurin gloymt, at føroyingar fylgja væl við í altjóðatíðindum, og at netið er atkomiligt hjá nógvum føroyingum. Orðatakið »Ofta etur hundur, tað hann havnar« er longu við at ganga út.

**Steinbjørn B. Jacobsen**

# Skemtilig viðmerking til eina avís

Siti júst nú við Dagblaðnum frá 25. september. Hetta blað, sum sigst verða málgagn hjá Fólkaflokkinum. Trúði, at Fólkaflokkurin var ein liberalur flokkur, men á síðu tvey síggi eg, at lesarabrøv og innsent tilfar bert verður tikið við eftir nærri avtalu. Hetta er væl ein prentvilla, ella er Dagblaðið kanska føroyska útgávan av Pravda.

Varð einaferð á almennum fundi. Tá undraðist ein áhoyrari á, at tað bert vóru fólkaflokspolitikarar við almennum starvi, og helst fleiri. Og satt at siga, so dugi eg heldur ikki at skilja, hví so er. Hetta er kanska orsøkin til, at hugflogið hjá býráðsvalevninum Jan Christiansen á síðu 3 ikki røkkur til at síggja, at fyri at Tórshavnar Kommuna skal sleppa at gera allar tær íløgur sum kommunan hevur hug til, skula teir gera avtalu við onkran, PRIVATAN VINNULÍVSMANN um at byggja tað, sum byggjast skal, fyri síðan at leiga bygningin frá viðkomandi. Tá verða leiguútreiðslur at bóka undir rakstur, og har er einki loft. Hetta havi eg ført fram á fundi hjá Kommunufelagnum, við landsstýri men teir skiltu hetta ikki. Tá liberalur hugsunarháttur manglar í flokkinum, var kanska eitt hugskot at Tórshavnar Kommuna søkti um limaskap í Føroya Kommunufelag.

Síðani lesi eg um statestikk og skattapolitik frá yvirvísmanninum ÓB. Sum vanligt verður ramsað upp um hagtøl. Síðan er ein heil síða um Jersey og lágan skatt. Men útreiðslusíðan er eins stór og føroyska fíggjarlógin. Á Jersey er einki vinnulív. Tí eru nærum øll í arbeiði hjá landinum. Út frá hesum komi eg til, at ÓB vil hava, at vit í Føroyum skulu hava lágan skatt, og at helst øll skulu arbeiða fyri land og kommunur. Tá kunnu vit hava lágan skatt og lága løn. Tí alt fer tá um sama kassa.

Harumframt tosar hann um, hví Ongland leggur trýst á Jersey viðvíkjandi skatti v.m. ÓB veit helst, men um hann ikki veit, skal eg fortelja honum at hetta trýst kemur úr ES og Bretlandi, og orsøkin er, at Jersey verður brúkt at vaska pengar hvítar og annars er nærum øll mafia í Italia, og Europa annars umboðað á Jersey. Men hetta hevði helst verði rætta fólkaslagið at fingið til Føroya. Ella fleiri stemmur til lista A sum onkur hevði sagt.

Kann í hesum sambandi nevna eina skemtiliga útsøluferð, eg gjørdi fyri tveimum árum síðan. Kendi handilsmannin, og hann bjóðaði mær sera fínar handskar fyri hálvan prís. Fólkaflokshandskar kallaði hann teir. Spurdi síðan, hvar navnið kom frá. Hann hevði lítlan hug at fortelja, men eg fekk úr honum, at veruliga orsøkin var, at hesir handskar høvdu serliga langar fingrar.

Á baksíðuni sæst Jørgen Niclassen siga sína hugsan um blaðgrein fyrr í vikuni. Her verður greitt frá, at vinnan fyrr fekk stuðul, men nú er eingin stuðul. Eisini konstaterar hann, at hóast sanering, megnar flotin ikki at endurnýggja seg. Men tað sæst ikki í greinini at Jørgen metir hetta sum ein trupulleika.

Men ikki er lætt hjá øllum at síggja trupulleika við at tað manglar í. Vit aðrir, sum eins og Jørgen og hansara menn royna okkara besta, máta okkara avrik eftir úrslitinum. Eingin kann annað enn at royna sítt besta. Men um tað ikki gevur úrslit, so er tað ikki gott nok. Manglar í er neyðugt at gevast. Okkara moralur forbjóðar okkum at fara í fólkaflokshandskar, fyri at finna tað seinastu krónurnar, sum mangla í.

Á baksíðuni sæst eisini Per í Leysari Luft. Nógv fyri, at summi ikki kunnu siga sína hjartans meining uttan at tað skal sigast sum skemt.

Hervið hava vit gjørt líkasum

**Eivind Jacobsen
Strendur**

# Kreativ skriving

*Aftur í vetur verður høvi at ganga til skeið í kreativari skriving hjá Rakel Helmsdal á Tórshavnar Kvøldskúla.*

Skeiðið snýr seg um at arbeiða við hugskotum, at finna háttir at fáa hugskot og ymisar háttir at arbeiða hesi hugskotini. Hvussu kanst tú burturúr einum orðið skapa eina heila søgu? Ella úr eini mynd, einum huglagið? Hví riggar ein tekstur og ikki ein annar? Hvussu byggir man upp eina søgu, eina frásøgn. Arbeitt verður nógv við skriviimprovisatiónum og „non-stop-writing".

Líkamikið hvussu tú hevur tað við at skriva, um tú ikki hevur gjørt annað við tað enn stílaskriving og onkran hendinga teldupost, ella um tú elskar at sita og skriva tankar og hugleiðingar niður, ella um tú longu hevur skrivað søgur ella yrkingar ella annað, tú kundi hugsa tær at víst øðrum ella fingið uppá prent, so er hetta skeiði eisini fyri teg.

Afturat skrivingini verður eisini nomið við tað óskrivaðu frásøgnina, forteljingina. Vit fara at royna okkum í hesi aldargomlu listini, sum í hesum døgum er við at verða endurfødd í okkara parti av heiminum, hóast kynstri næstan var um at doyggja út.



*Rakel Helmsdal*

Skeiði er hvørt hóskvøld allan vetur, byrja verður hásdagin í komandi viku tann 5. oktober. Í vetur verða tveir bólkar, ein fyri nýggjar luttakarar, og ein fyri tey, sum ætla sær at halda fram har, vit sleptu seinasta vetur.